








Ov tíðliga í verðina

Í Prematurfelagnum stuðla og ráðgeva vit foreldrum at ov tíðliga føddum børnum.

Telefonlinja okkara svarar mánadag til hósdag á tlf 263868

Eisini ber til at skriva til okkara á prematur@post.olivant.fo



almannastovan

HØVUÐSBARNAVERNDARNEVNDIN
skrivstovan

## Samskipari

Vit sóknast eftir einum samskipara til skrivstovuna hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini (HBVN) at seta skjótast til ber. Á skrivstovuni starvast 2 fólk.

**Arbeiðsuppgávur**
Saman við fulltrúa á skrivstovuni hevur tann, ið settur verður, ábyrgdina av at skipa og samskipa arbeiðið hjá HBVN og samskifta við aðrar myndugleikar á barnaverndarøkinum og deildir innanhýsis á Almannastovuni.

**Uppgávurnar hjá skrivstovuni eru m.a.**
- at fyrireika mál, áðrenn tey verða løgd fyri nevndina og kanna eftir og tryggja, at mál eru nóg væl upplýst sambært barnaverndarlógini og fyrisitingarrættarligum reglum
- at fyrireika, skipa og samskipa avgerðar- og samráðingarfundir
- at skriva fundarfrágreiðing, gerðabók og avgerðarskriv
- at umsita fíggjarviðurskifti, ið eru tengd at virkseminum og lógarbundnu útreiðslunum hjá nevndini í samstarvi við fíggjardeildina á Almannastovuni
- at gera ársfrágreiðing um virksemið hjá HBVN
- at gera kunningartilfar annars
- at skipa fyri fundum og skeiðum um fyrisitingarøkið

**Førleikakrøv**
Vit ynskja at tú hevur
- løgfrøðiliga, sosial-/samfelagsfrøðiliga ella aðra viðkomandi útbúgving á í minsta lagi bachelorstøði
- fyrisitingarligar royndir innan tað almenna kann vera ein fyrimunur, men er ikki ein treyt.

**Vit ynskja okkum**
ein starvsfelaga, sum
- dugir at arbeiða sjálvstøðugt, miðvíst og skipað
- hevur góð samstarvsevni
- dugir at orða seg í skrift og talu
- hevur teldukunnleika á brúkarastøði.

**Setanar- og lønarviðurskifti**
Viðkomandi verður settur við tilvísing til leiðaran á stjórnardeildini á Almannastovuni. Starvið verður sett og lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

**Nærri upplýsingar**
Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til Mariu Jacobsen, leiðara á stjórnardeildini á tlf. 215491 ella Hjørdis S. Johannesen, samskipara á HBVN-skrivstovuni, tlf. 215478.

**Freist at søkja**
Skrivlig umsókn skal verða Almannastovuni í hendi í seinasta lagi 18. august 2009 kl. 12 00 - Vinarliga merk brævbjálvan "samskipari til HBVN" og send umsóknina til: Almannastovuna, Smyrilsvegur 20, Postboks 3096, 110 Tórshavn
www.almannastovan.fo
almannastovan@almannastovan.fo